Uttanríkis- og vinnumálaráðið

Dagfesting:	29.02.2024
Mál nr.:	23/22090
Málsviðgjørt:	ABD
Ummælistíð:	2.-17.11.2023
Eftirkannað:	10.12.2024-12.01.2024

Uppskot til

Løgtingslóg um broyting í anordning om ikrafttræden for Færøerne af søloven og úrgildisseting av lov om Rederes Forpligtelse til at meddele statistiske Oplysninger
(Myndugleikaflytingar vegna yvirtøku av málsøkinum, sjórættur o.a.)

§ 1

Í anordning nr. 187 af 8. februar 2017 om ikrafttræden for Færøerne af søloven, sum seinast broytt við anordning nr. 1121 af 29. juni 2022, verða gjørdar hesar broytingar:

1. Í § 153, stk. 5, § 154, stk. 1, § 187, § 199, § 485, § 515 b og § 516 verður "Søfartsstyrelsen" broytt til: "Sjóvinnustýrið".

2. Í § 142, stk. 1, 1. pkt., § 142, stk. 2, § 201, stk. 3-4, § 202, stk. 4, 4. pkt., § 482, stk. 1, 1. pkt., § 514 b, stk. 3 og § 516 verður "erhvervs- og vækstministeren**"** broytt til: "landsstýrisfólkið"**.**

3. Í § 175, stk. 6, 1. og 2. pkt., § 186, stk. 4, 1. og 2. pkt., § 186, stk. 5-7, § 194, stk. 4, § 198, stk. 1-4, § 202, stk. 4, 2. pkt., § 229 a, stk. 3, § 454, stk. 1, 2. pkt., § 461, 2. pkt., § 485, § 505 a, stk. 1 og stk. 2, § 505 b, stk. 1 og stk. 2, verður "Erhvervs- og vækstministeren" broytt til: "Landsstýrisfólkið"**.**

4. Í § 154, stk. 1, § 187, § 199, § 475, stk. 4, § 482, stk. 1, 2. pkt. og § 482, stk. 3, 2. pkt. verður "erhvervs- og vækstministeren" broytt til: "landsstýrisfólkinum".

5. Í § 474, stk. 2, nr. 3, § 477, stk. 3 og § 479, stk. 2 verður ", Søfartsstyrelsen" strikað.

6. Í § 516 verður "ministeren" broytt til: "landsstýrisfólkið".

§ 2

Lov nr. 75 af 29. marts 1904 om Rederes Forpligtelse til at meddele Statistiske Oplysninger verður sett úr gildi.

§ 3

Stk. 1. Henda løgtingslóg kemur í gildi tann 29. juli 2025.
Stk. 2. § 2 kemur í gildi dagin eftir, at løgtingslógin er kunngjørd.

Kapittul 1. Almennar viðmerkingar

1.1. Orsakir til uppskotið

Landsstýrið hevur gjørt av at yvirtaka málsøkið, sjórættur. Yvirtøkan er sett út í kortið í samgonguskjalinum í desember 2022, tá ið semja varð gjørd um at yvirtaka málsøkið.

Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um ræði á málum og málsøkjum (Yvirtøka av málsøkinum sjórættur) verður nú lagt fyri Løgtingið. Hetta soleiðis, at føroyskir myndugleikar, sbrt. lóg um mál og málsøki føroyskra myndugleika at yvirtaka, fáa lóggávuvaldið og útinnandi valdið á málsøkinum.

Tá ið málsøkið er yvirtikið, stendur verandi lóggáva á økinum við, sbrt. § 5 í yvirtøkulógini, sbr. § 13 í heimastýrislógini við teirri broyting sbr. § 2 í ræðislógini, men tær heimildir ella skyldur, sum liggja hjá donskum myndugleikum, verða við uppskotinum fluttar til avvarðandi føroyskar myndugleikar.

1.2. Galdandi lóggáva

Lóggáva á økinum, sum skal yvirtakast, er sjólógin, t.e. anordning nr. 187 frá 8. februar 2017 om ikrafttræden for Færøerne af søloven, sum seinast broytt við anordning nr. 1121 frá 29. juni 2022.

Sjólógin regulerar í høvuðsheitum viðurskifti millum privatar partar í samband við sigling, tó hevur sjólógin eisini ásetingar um myndugleikauppgávur, heruppií at skriva út sertifikat og at hava eftirlit við, at lógin verður hildin.

Í sjólógini liggja ávísar heimildir hjá Søfartsstyrelsen og hjá erhvervs- og vækstministeren. Heimildirnar hjá Søfartsstyrelsen snúgva seg m.a. um útgávu av sertifikatum, sum eru kravd sambært sjólógini. Hesi sertifikat verða givin út sum prógv fyri, at reiðaríið hevur teknað tær sambært lógini kravdu tryggingar. Eisini snúgva heimildirnar hjá Søfartsstyrelsen seg m.a. um, at myndugleikin kann nokta skipum atgongd í havn og at fara úr havn, um skipið ikki hevur kravd sertifikat. Heimildirnar hjá erhvervs- og vækstministeren snúgva seg m.a. um at áseta reglur í kunngerð og at delegera avgerðarheimildir til Søfartsstyrelsen.

1.3. Endamálið við uppskotinum

Endamálið við hesum lógaruppskoti er at nágreina, hvør føroyskur myndugleiki hevur tær ymsu skyldurnar og heimildirnar sambært sjólógini eftir yvirtøkuna tann 29. juli 2025.

Skotið verður upp, at tær ásetingarnar, har heimildir eru hjá Søfartsstyrelsen, verða broyttar soleiðis, at heimildirnar aftaná yvirtøkuna verða hjá Sjóvinnustýrinum. Skotið verður eisini upp, at tær heimildir, sum í dag eru hjá erhvervs- og vækstministeren, aftaná yvirtøkuna eru hjá landsstýrinum.

Í aðrar mátar stendur verandi lóggáva á økinum við, sbr. § 5 í yvirtøkulógini (lóg nr. 79 frá 12. mai 2005) og sbr. § 13 í heimastýrislógini (Lov nr. 11 frá 31. mars 1948).

Í uppskotinum verður í fleiri førum nevnt, at heimildir verða lagdar til “landsstýrisfólkið”. Orðingin verður brúkt fyri at hava ein kynsneutralan málburð. Men tað merkir, samanber við Ministerialskipanina, sum er ásett í stýrisskipanarlógini § 33, stk. 1, at heimildin liggur hjá tí landsstýriskvinnuni ella tí landsstýrismanninum, sum løgmaður hevur sett at røkja málsøkið.

Í sambandi við fyrireikingarnar at yvirtaka sjórættin er komið fram á lov nr. 75 af 29. april 1904 om Rederes Forpligtelse til at meddele Statistiske Oplysninger, som ændret ved lov nr. 127 af 15. april 1930. Talan er um lóggávu, sum er yvirtikin. Lógin snýr seg um skyldur reiðarans at lata inn hagtøl og um revsing fyri brot á hesa skyldu. Mett verður ikki, at lógin frá 1904 hvur nakran týdning longur, tí Hagstova Føroya hevur við heimild í løgtingslóg nr. 33 frá 7. mai 1991 heimild til krevja allar neyðugar upplýsingar frá einstaklingum, fyritøkum, feløgum og stovnum við heimstaði ella virksemi í Føroyum. Skotið verður tí upp, at hendan lógin nú verður sett úr gildi.

1.4. Samandráttur av nýskipanini við uppskotinum
Við hesum lógaruppskoti verður nágreinað í sjólógini, hvør føroyskur myndugleiki hevur tær ymsu skyldurnar og heimildirnar eftir yvirtøkuna. Eisini verður skotið upp at seta úr gildi eina eldri lóg frá 1904 um skyldu reiðarans at lata inn hagtøl.

1.5. Ummæli og ummælisskjal
Uppskotið er sent til ummælis hjá Umhvørvismálaráðnum, Løgmálaráðnum, Fiskivinnu- og samferðslumálaráðnum, Sjóvinnustýrinum, Umhvørvisstovuni, Heilsufrøðiligu starvsstovuni, Kommunufelagnum, Landsverki, MRCC, Vinnuháskúlanum, Vinnustovninum, Vinnuhúsinum, Vørn, Reiðarafelagnum fyri Handilsskip, Føroya Reiðarafelag, Føroya Skipara- og Navigatørfelag, Maskinmeistarafelagnum og Føroya Fiskimannafelag.

Innkomnu hoyringarsvarini eru løgd við sum fylgiskjal 2-7.

Reiðarafelagið fyri Handilsskip, Føroya Reiðarafelag, Heilsufrøðiliga starvsstovan og Vørn hava svarað, at tey ongar viðmerkingar hava til uppskotið.

Sjóvinnustýrið vísir í sínum hoyringarsvari á tvær skrivivillur í uppskotinum. Hesar villur hevur Uttanríkis- og vinnumálaráðið nú rættað.

Umhvørvismálaráðið vísir í sínum hoyringarsvari á, at tað hevur týdning sum skjótast at fara undir arbeiðið at lýsa, hvørjar fyrisitingarligar og fíggjarligar avleiðingar yvirtøkan av sjórættinum hevur fyri føroyska sjóvinnuumsiting í breiðari merking. Víst verður á, at Føroyar hava nógvar altjóða skyldur sum flaggland, og at tað er umráðandi, at uppgávu- og ábyrgdarbýtið er væl lýst, og at málsøkini verða skynsamliga býtt millum landsstýrisfólkini. Eisini verður víst á týdningin av, at sjóvinnuumsitingin verður raðfest fíggjarliga og fyrisitingarliga.

Til viðmerkingarnar frá Umhvørvismálaráðnum skal Uttanríkis- og vinnumálaráðið vísa á, at yvirtøkan verður eftir ætlan tann 29. juli 2025. Uttanríkis- og vinnumálaráðið er, saman við Sjóvinnustýrinum og Søfartsstyrelsen, farið undir arbeiðið at dagføra sjólógina, so lóggávan er dagførd innan yvirtøkuna. Eisini verður arbeitt við at lýsa málsøkið meira nágreiniligt, so tað verður heilt greitt, hvørjar uppgávur føroyskir myndugleikar yvirtaka, so føroyska sjóvinnuumsitingin á yvirtøkudegnum er klár at røkja tær fyrisitingarligu uppgávurnar sambært sjólógini. Í uppskotinum til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um ræði á málum og málsøkjum (Yvirtøka av málsøkinum sjórættur), sum verður viðgjørt samstundis sum hetta uppskotið, verður lagt upp til, at fyrisitingin verður uppraðfest við tveimum ársverkum í sambandi við yvirtøkuna. Lagt verður upp til, at Uttanríkis- og vinnumálaráðið fær játtan til eitt ársverk í 2024, og at Sjóvinnustýrið fær játtan til eitt ársverk í 2025.
Aðrar viðmerkingar eru ikki komnar til uppskotið.

Kapittul 2. Avleiðingarnar av uppskotinum

2.1. Fíggjarligar avleiðingar fyri land og kommunur
Tað standast ikki fíggjarligar avleiðingar av uppskotinum, av tí at broytingarnar eru ein avleiðing av yvirtøkuuppskotinum av sjórættarmálsøkinum.

Fíggjarligu avleiðingarnar av yvirtøkuni av sjálvum sjórættarmálsøkinum eru lýstar í kap. 2.1. í løgtingsmáli nr. xx/2023: Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um ræði á málum og málsøkjum (Yvirtøka av málsøkinum sjórættur).

2.2. Umsitingarligar avleiðingar fyri land og kommunur
Tað standast ikki umsitingarligar avleiðingar av uppskotinum, av tí at broytingarnar eru ein avleiðing av yvirtøkuuppskotinum av sjórættarmálsøkinum.

Umsitingarligu avleiðingarnar av yvirtøkuni av sjálvum sjórættarmálsøkinum eru lýstar í kap. 2.2. í løgtingsmáli nr. xx/2023: Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um ræði á málum og málsøkjum (Yvirtøka av málsøkinum sjórættur).

2.3. Avleiðingar fyri vinnuna
Uppskotið hevur ikki avleiðingar fyri vinnuna.

2.4. Avleiðingar fyri umhvørvið
Uppskotið hevur ikki avleiðingar fyri umhvørvið.

2.5. Avleiðingar fyri serstøk øki í landinum
Uppskotið hevur ikki avleiðingar fyri serstøk øki í landinum.

2.6. Avleiðingar fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir
Uppskotið hevur ikki avleiðingar fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir.

2.7. Millumtjóðasáttmálar á økinum
Uppskotið hevur ikki avleiðingar fyri millumtjóðasáttmálar.

2.8. Tvørgangandi millumtjóðasáttmálar
1) Evropeiski mannarættindasáttmálin, EMRS, "Anordning nr. 136 af 25. februar 2000 om ikrafttræden for Færøerne af lov om den europæiske menneskerettighedskonvention". Sáttmálin varð settur í gildi fyri Føroyar við lóg tann 1. mai 2000.

   Uppskotið hevur ikki avleiðingar í mun til nevnda sáttmála.

2) Sáttmáli Sameindu Tjóða um rættindi hjá einstaklingum, ið bera brek, ið áleggur limalondunum at menna og fremja politikk, lógir og fyrisitingarlig mál, ið skulu tryggja rættindi hjá fólki, ið bera brek.

   Sáttmálin varð settur í gildi fyri Føroyar tann 23. august 2009 við "Bekendtgørelse nr. 35 af 15. september 2006 om rettigheder for personer med handicap".

   Uppskotið hevur ikki avleiðingar í mun til nevnda sáttmála.

2.9. Markaforðingar
Uppskotið hevur ikki slíkar avleiðingar.

2.10. Revsing, fyrisitingarligar sektir, pantiheimildir ella onnur størri inntriv
Uppskotið hevur ikki slíkar avleiðingar.

2.11. Skattir og avgjøld
Uppskotið hevur ikki slíkar avleiðingar.

2.12. Gjøld
Uppskotið hevur ikki slíkar avleiðingar.

2.13. Áleggur lógaruppskotið likamligum ella løgfrøðiligum persónum skyldur?
Uppskotið hevur ikki slíkar avleiðingar.

2.14. Leggur lógaruppskotið heimildir til landsstýrisfólkið, ein stovn undir landsstýrinum ella til kommunur?
Ja, við yvirtøkuni fær landsstýrismaðurin ella landsstýriskvinnan á økinum heimildirnar, sum higartil hava ligið hjá donskum ráðharra.

2.15. Gevur lógaruppskotið almennum myndugleikum atgongd til privata ogn?
Uppskotið hevur ikki slíkar avleiðingar.

2.16. Hevur lógaruppskotið aðrar avleiðingar?
Uppskotið hevur ikki aðrar avleiðingar.

2.17. Talvan: Yvirlit yvir avleiðingarnar av lógaruppskotinum

	Fyri landið ella landsmyndug-leikar	Fyri kommunalar myndugleikar	Fyri pláss ella øki í landinum	Fyri ávísar samfelags-bólkar ella felagsskapir	Fyri vinnuna
Fíggjarligar ella búskaparligar avleiðingar	Nei	Nei	Nei	Nei	Nei
Umsitingarligar avleiðingar	Nei	Nei	Nei	Nei	Nei
Umhvørvisligar avleiðingar	Nei	Nei	Nei	Nei	Nei
Avleiðingar í mun til altjóða avtalur og reglur	Nei	Nei	Nei	Nei	Nei
Sosialar avleiðingar			Nei	Nei	

Kapittul 3. Serligar viðmerkingar

3.1. Viðmerkingar til ta einstøku greinina

Til § 1, nr. 1
Við hesi grein í uppskotinum verður myndugleikaflyting gjørd til samsvarandi føroyska myndugleikan. Har myndugleikin áðrenn yvirtøkuna var hjá Søfartsstyrelsen, verður myndugleikin eftir yvirtøkuna hjá Sjóvinnustýrinum.

Til § 1, nr. 2
Við hesi grein í uppskotinum verður tað í teimum ásetingunum, har tað nú stendur "erhvervs- og vækstministeren", broytt til "landsstýrisfólkið".

Til § 1, nr. 3
Við hesi grein í uppskotinum verður tað í teimum ásetingunum, har tað nú stendur "Erhvervs- og vækstministeren", broytt til "Landsstýrisfólkið".

Til § 1, nr. 4
Við hesi grein í uppskotinum verður tað í teimum ásetingunum, har tað nú stendur "erhvervs- og vækstministeren", broytt til "landsstýrisfólkinum".

Til § 1, nr. 5
Í § 474, stk. 2, nr. 3, § 477, stk. 3 og § 479, stk. 2 verður ", Søfartsstyrelsen" strikað, tí mett verður, at Søfartsstyrelsen aftaná yvirtøkuna ikki skal hava hesar heimildirnar, tá økið er yvirtikið. Ásetingarnar snúgva seg um sjóforhoyr. Sjóvinnustýrið hevur longu sambært galdandi ásetingum somu heimildir sum Søfartsstyrelsen hevur, tá tað snýr seg um sjóforhoyr. Tí er ikki viðkomandi at broyta "Søfartsstyrelsen" til "Sjóvinnustýrið" í hesum føri, men skotið verður upp, at "Søfartsstyrelsen" verður strikað úr ásetingunum. Tá økið verður yvirtikið, hevur Søfartsstyrelsen ikki myndugleikauppgávur longur sambært lógini.

Til § 1, nr. 6
Við hesi grein í uppskotinum verður tað í teimum ásetingunum, har tað nú stendur "ministeren", broytt til "landsstýrisfólkið".

Til § 2
Skotið verður upp at seta lov nr. 75 af 29. april 1904 om Rederes Forpligtelse til at meddele Statistiske Oplysninger som ændret ved lov nr. 127 af 15. april 1930 úr gildi. Nýggjari lóggáva er á økinum, og tí er ikki tørvur á hesari lógini longur. Løgtingslóg nr. 33 frá 7. mai 1991 um Hagstovu Føroya hevur tær neyðugu heimildirnar at krevja upplýsingar til hagfrøðiligar uppgerðir, og tí verður skotið upp at seta lov nr. 75 af 29. april 1904 úr gildi.

Til § 3
Henda løgtingslóg kemur í gildi tann 29. juli 2025, tó kemur § 2 í gildi dagin eftir, at lógin er kunngjørd.

Uttanríkis- og vinnumálaráðið, 29. februar 2024

Høgni Hoydal

landsstýrismaður

/ Herálvur Joensen

Yvirlit yvir fylgiskjøl:
Fylgiskjal 1: Javntekstur
Fylgiskjal 2: Ummæli frá Reiðarafelagnum fyri Handilsskip
Fylgiskjal 3: Ummæli frá Føroya Reiðarafelag
Fylgiskjal 4: Ummæli frá Vørn
Fylgiskjal 5: Ummæli frá Heilsufrøðiligu starvsstovuni
Fylgiskjal 6: Ummæli frá Sjóvinnustýrinum
Fylgiskjal 7: Ummæli frá Umhvørvismálaráðnum